LESARABRØV/TÍ›INDASKRIV

Eitt 4-ára skei› fari ›

Elisabeth Joensen (Betta)
b‡rá›slimur og valevni Sambandsfloksins

Skjótt rennur tí›in, nú er aftur b‡rá›sval í hondum.

Ta› kom heldur óvart á meg, fyri f‡ra árum sí›ani, at eg skuldi umbo›a Sambandsflokkin í B‡rá›num í Klaksvík.

Úrsliti› av valinum fall solei›is, at Fólkaflokkurin og Tjó›veldisflokkurin samanlagt fingu meirlutan. Hesir tóku seg saman og skipa›u samgongu.

Tá i› n‡ggja b‡rá›i› skuldi velja nevndir, fekk Sambandsflokkurin tilbo› um at koma í valbólk saman vi› samgonguflokkunum. Hetta hev›i eg ongan hug til, skeyt upp, at Sambandsflokkurin kom vi› í samgonguna.

Aftaná samrá›ingar komu Sambandsflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin vi› í Samgonguna.

Roynt var› at fáa formanssessin í onkrari av teimum størru nevndunum, men hetta eydna›ist ikki.

Hetta valskei›i› havi eg umbo›a› flokkin í Mentanar-/Sosialu nevnd, Teknisku nevnd, Heilsunevndini og nevndini fyri umlættingarheimi› "Dáin". Flokkinum var› lova› formanssessin í næstu nevnd, i› fór at ver›a stovna›, og gjørdist eg tí forma›ur í nevndini fyri sjálvsognarstovnin "Mylnuhúsi›", sum er ein barnaansingarstovnur.

Harafturat fekk Sambandsflokkurin umbo› í a›rar nevndir í kommununi eisini.

Ta› var rætt at fara upp í samgonguna. Ein hevur størri møguleikar fyri at fylgja vi› og ávirka tey mál, i› eru fyri.

Ta› var ikki lætt at vera n‡valdur b‡rá›slimur, alt var ókent og fremmant, lítið› var› kunna› um arbei››, tí haldi eg ta› vera umrá›andi, at skei› ver›a hildin her nor›uri fyri n‡valdar b‡rá›slimir, eins og gjørt ver›ur a›ra sta›ni.

Hugsa vit um, hvussu knípi› ta› hevur veri› vi› peningi til íløgur hesi árini, so kunnu vit tó fegnast um ta›, sum hent er. Ta› eru stór framstig hend og fari› er í holt vi› ymisk øki, i› hava veri› misrøkt í mong ár.

Ta› er kortini ikki rætt at siga, at ein er heilt nøgdur. Okkurt kundi veri› ø›rvísi og betri og fleiri mál, i› eru samtykt, hava drigi› alt ov langt út. Sagt ver›ur, at nor›oyingar eru eitt toli› fólkaslag, og ta› gongur sjón fyri søgn.

Samstundis, sum mangt er fingi› av skafti, hevur veri› roynt at gjalda skuldina ni›ur, og kunnu vit gle›ast um, at fíggjarstø›an er munandi batna›.

B‡rá›slimir eiga tó bert ein lítlan part av æruni. Vit eru vælsigna› vi› næstan ókendum fiskiríkidømi og methøgum fiskaprísum. Alivinnan hevur gingi› serstakliga væl. Vinnulívi› hevur blóma›, og arbei›i hevur veri› til flest allar arbei›sførar hendur. Skattakrónurnar eru vor›nar fleiri og fleiri.

Tá i› ringast stó› til, skylda›i Kommunan á lei› f‡ra álíkningar, og tá i› hetta ári› er li›ugt, vænta vit at vera komin ni›ur um eina álíkning.

Vit kenna ikki framtí›ina, men vit kenna søguna. Aftaná gó›ar tí›ir koma verri tí›ir. Ney›ugt ver›ur tí í komandi tí›um at arbei›a skilagott vi› fíggjarligum varsemi.

Ta› ynskir Sambandsflokkurin at gera.

N‡tt samstarv í føroysku oljuvinnuni

Tí›indaskriv

P/F Eimskip í Føroyum og SBS Logistics Ltd gera samstarvsavtalu

Eitt samstarv millum tvær fyritøkur vi› drúgvum royndum innan logistik kemur at styrkja fyrireikingarnar til eina komandi oljuvinnu í Føroyum. Rá›stevnan Offshore 2000, i› ver›ur í Nor›urlandahúsinum í døgunum 24-25 okt., er vald til forum fyri kunning um samstarvsavtaluna millum P/F Eimskip í Føroyum og SBS Logistics Ltd.

SBS hevur sín uppruna í Hetlandi og byrja›i virksemi sítt um ta› mundi›, tá oljuvinnan veruliga tók dik á seg har. Ì dag er høvu›skrivstovan í Aberdeen. SBS hevur bjó›a› heildar flutningsloysnir í nógv ár. Ta› hava serliga veri› oljuútger›arhavnir í Nor›sjónum, i› hava fingi› ágó›an av teirra tænastum. Tó má leggjast afturat, at SBS er eitt felag, i› upp gjøgnum tí›irnar hevur havt eitt tætt samstarv vi› fiskivinnuna í Hetlandi. SBS Logistics Ltd hevur virksemi og skrivstovur í Hetlandi, Peterhead, Edzell og ikki minni enn tríggjar skrivstovur í Aberdeen. Nógvu árini sum veitari av tænastum til størstu olju- og gassfyritøkurnar í heiminum hava givi› SBS Logistics eina servitan um flutningstørvin hjá oljufeløgum.

Eimskip hinvegin hevur øllum kunnugt bjó›a› heildar flutningsloysnir í Føroyum sí›an 1990 og siglir í dag á høvu›shavnir í Evropa, Skandinávia, USA og Kanada umframt til Íslands. Í dag arbei›a 30 starvsfólk hjá P/F Eimskip í Føroyum. Tænasturnar fevna bæ›i um lossing og landing av skipum, vørugoymslu, flutning innanlands í Føroyum, flogfrakt og sjálvandi sjófrakt. Tvey n‡ggj og tøkniliga framkomin skip eru nú sett í sigling, og hevur hetta vi› sær skjótari fer› og enn tryggari flutning.

Saman kunnu Eimskip og SBS tí útvikla eitt spennandi samstarv — Eimskip vi› síni vitan um føroysk vi›urskifti og royndum í vinnulívinum her heima og SBS vi› síni servitan um logistikloysnir til oljuvinnuna. Harafturat hava hesar fyritøkur skrivstovur og virksemi á stø›um av alstórum t‡dningi fyri oljuvinnuna. Lokalt og globalt rennur saman í eitt.

P/F Eimskip í Føroyum og SBS Logistics Ltd hava eisini gjørt avtalu um upplæring av starvsfólki. Flutningur av vitan og royndum millum starvsfólk úti og heima ver›ur tí ein avgerandi táttur fyri, at samstarvi› skal virka til fulnar.

Ikki kann sigast anna› enn, at SBS Logistics Ltd og P/F Eimskip í Føroyum hava valt røttu løtuna til at byrja eitt tílíkt samstarv, i› væntandi ver›ur av stórum t‡dningi fyri oljuvinnuna her á landi.

Stjórin á SBS Logistics Ltd, Keith Fletcher, hevur gjørt sínar vi›merkingar til samstarvi›: "Vit eru sera væl nøgd vi› at hava fingi› eitt samstarv í lag vi› eitt føroyskt felag, sum stendur so høgt í metum hjá okkum. Hvørja nyttu oljuvinnan fær av hesum samstarvi, er mær púra greitt — okkara samstarv er í løtuni besta loysnin á markna›inum."

Spurd, hví Eimskip júst hevur valt at samstarva vi› SBS, sigur stjórin á P/F Eimskip í Føroyum, Linda B. Gunnlaugsdóttir: "SBS byrja›i í Hetlandi, og tí hava tey vitan um oljuvinnu í einum oyggjasamfelag, i› hevur bæ›i fiski- og oljuvinnu sum høvu›svinnur. Vi› hesum samstarvi kunnu vit veita ta

FLÚGV BÍLIGA

til Danmarkar og Íslands

Heystferðir
Frá 23. oktober til 15. desember
Til Keypmannahavnar og aftur
Úr Keypmannahavn og aftur
Til Íslands og aftur
Úr Íslandi og aftur
1500,-

Jólaferðir
Frá 8. desember til 7. januar
Til Keypmannahavnar og aftur
Til Billund og aftur
Til Íslands og aftur
1250,-

Vanligur APEX prísur til DK kr. 2.500,- og til ÍS kr. 2.200,-

Galdandi frá 23. oktober til 15. desember. Heystferðirnar kunnu í mesta lagi vara ein mánaða og í minsta lagi yvir leygardag og sunnudag. Ferðirnar skulu bileggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast. Til Danmarkar skulu minst tvey ferðast saman. Ferðaavgjald kemur afturat prisinum.
(Keypmannahavn 335,- Ísland 236,-)

Galdandi frá 8. desember til 7. januar. Forsølan er frá 1. november til 11. desember. Jólaferðirnar skulu vara millum 7 og 21 dagar. Ferðirnar skulu bileggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast. Ferðaavgjald kemur afturat prisinum.
(Keypmannahavn 335,- Billund 377,- Ísland 236,-)

SAM208 TEL 333333

Atlantic Airways
Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið

ítróttur

Nr. 204 • Týsdagur • 24. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Katrin Johansen saman við teimum báðum føroysku gullfiskunum. Myndin er tikin, áðrenn tær fóru til Australia

ÍSB svimjararnir seta Føroyar á heimskortið

Enn eina ferð syrgja føroysku svimjararnir fyri, at føroyska merkið sæst, og at Føroyar fáa nógva umrøðu kring allan heimin

SVIMJING
Jóannes Hansen

Tað er ikki ókent, men tað er eins hugaligt hvørja ferð. Olympisku leikirnir fyri brekað eru í hesum døgum í Sidney í Australia, og sum ikki eina ferð gera føroysku svimjararnir um seg.

Tvær føroyskar gentur luttaka í svimjikappingunum, og bæði Ester Gaard Hansen úr Havnini og Heidi Andreasen av Eiði hava svomið skjótari, enn tær nakrantíð áður hava gjørt.

Meðan føroyingar heima á landi lógu í fasta svøvni sunnunáttina stríddust tær báðar í Sidney, og tað eydnaðist Heidi Andreasen at koma upp á skammulin, har bara tey bestu sleppa upp í part. Í 400 metra frí kappingini vann Heidi silvur. Hon svam sum um talan var um ein vanligan venjingartíma og læt seg ikki órógva av, at tað vóru fleiri enn seks túsund áskoðarar í høllini, at upptøkutólið snurraði, og at tað tískil sótu millónir kring knøttin og fylgdu við og undraðust yvir, hvat Føroyar eru fyri nakað og hvar tær eru.

Vit ynskja Heidi, familjuni, ÍSB og øllum føroyingum hjartaliga tillukku við framúr avrikinum.

At tað verður sjónvarpað kring allan knøttin, tá ein føroysk genta í harðari kapping við svimjarar alla staðni frá vinnur silvur og hevur føroyska Merkið um herðarnar, tá hon tekur ímóti silvurkrónuni, er ein so stór umrøða fyri Føroyar, sum tað næstan ikki kann sigast frá.

Føroysku svimjararnir hava vant sera nógv undan fráferðini til Australia. Tað er hugaligt, at tær longu hava vunnið fleiri finaluplpáss. Silvurkrónan hjá Heidi Andreasen er sjálvandi krúnan á verkinum. Svimjararnir skulu vita, at tað í Føroyum verður fylgt væl við, hvussu tær fara at standa seg í kappingunum, sum eru eftir. Teimum verður ynskt alt tað besta.

Royndur venjari

Venjari hjá føroysku svimjarunum er Katrin Johansen, sum saman við øðrum svimjarum hevur verið føroyskari svimjing og Føroyum sum heild til miklan sóma í olympiskum kappingum fyri brekað í Soul í Suðurkorea og í Barcelona í Spania.

At Ester og Heidi hava Katrina við sær í Sidney er av alstórum týdningi. At vera við í olympiskari kapping fyri fyrstu ferð er nýtt, og tað skal kanska ikki so nógv til at missa stevið.

Katrin er myndug, og tað hoyrist, tá hon úttalar seg, at hon veit, hvat hon tosar um. Hon roynir at taka trýstið av svimjarunum, og tað er skilagott. Tað er skilligt, at Katrin hevur lært svimjararnar, at tær skulu ikki leggja trýst á seg sjálvar. Tí undirstrika Ester, Heidi og Katrin ferð eftir ferð, at kappingin er hørð, og at tað tískil er torført at siga nakað um møguleikarnar at fáa fleiri heiðurskrónur. Men tað skilst á lagnum, at møguleikin er ikki eingin.

Heidi vann silvur frammanfyri 16.000 áskoðarum

Føroysku svimjararnir í Paralympisku leikunum í Sydney hava fingið sítt fyrsta heiðursmerki til høldar. Heidi Andreasen kom næst á mál í 400 metur frísvimjing

SVIMJING
Stefan í Skorini

Hetta var fyrsta heiðursmerki á hesum leikunum, men enn eru tær báðar Esther Gaard Hansen úr Havn og Heidi Andreasen av Eiði ikki lidnar við sínar kappingar, og fleiri finaluplpáss verður tað møguliga til í teimum kappingunum, sum eftir eru.

Heidi Andreasen var á geil 5 í finaluni, og var mett at vera næstbest. Tað megnaði hon eisini at prógva við silvrinum. Tá svimjararnir høvdu svomið hundrað metrar, varð longu líkt til, at Heidi í minsta lagi fór at fáa heiðursmerki av onkrum slag. Heidi setti eisini persónligt met, og hon tók heili tólv sekund av sínum gamla persónliga meti.

Esther Gaard Hansen hevur eisini verið í kapping. Hon kom ikki í finaluna, men hon megnaði eins og Heidi at betra egna met sítt við tólv sekundum. Við hesum hava báðar rokkið sínum máli, sum var at seta persónligt met.

Torir ikki at vóna meira

Við Útvarp Føroya sigur Heidi Andreasen, at hon ikki torir at rokna við fleiri heiðursmerkjum, men at tær báðar fara sjálvandi at gera alt fyri at røkka fleiri. Hon vísir á, at kappingin er so ómetaliga hørð millum svimjararnar, og ílt er at vita, um onkur teirra kanska hevur tikið seg nógv fram seinastu tíðina. Heldur ikki ber til at vita frammanundan, hvussu tað fer at ganga tann dagin, kappingin er.

Um finaluna sunnudagin sigur Heidi, at hon visti, at møguleikin fyri einum heiðursmerki var til staðar, men at hon ikki tordi at vænta nakað, tí tær allar vóru só tættar. Gleðin um úrslitið var sum vera man sera stór hjá Heidi. Hetta er lønin fyri harða venjing seinastu árini.

Tá Heidi fekk sítt heiðursmerki um hálsin á hátíðarhaldi, hevði hon føroyska Merkið um herðarnar. Hon hevur ikki orð fyri teimum kenslum, sum tá bylgjast í einum, men tað var ein ótrúligt uppliving, tá flaggið varð vundið á stong.

Til finaluna vóru 16.000 áskoðarar og hugdu. Tveir av luttakarunum vóru úr Australia, og teir fingu sjálvandi stóran stuðul. Hetta nervaði tó ikki Heidi, sum svam á mál sum nummar tvey.

Væl nøgd

Katrin Johansen er venjari hjá teimum báðum føroysku luttakarunum. Hon sigur við útvarpið, at hetta hevur stóran týdning, tí tað gevur teimum mót til hinar kappingarnar. Tær hava nú gjørt vart við seg og Føroyar við úrslitunum.

Katrin leggur dent á, at tær báðar hava fingið sera góð úrslit. Báðar hava sett persónligt met við tólv sekundum, og tað er ikki so lítið. Hon er annars sera væl nøgd við úrslitini higartil.

– Hetta er prógv um, at vit eru enn á toppinum á paralympisku leikunum, og okkara vónir eru góðar til fleiri finaluplpáss seinni og møguliga eisini heiðursmerki, sigur Katrin Johansen, venjari.